Richard Mortensen, sølu- og marknaðarleiðari á MEST á føroyska básinum á oljumessuni í Aberdeen. Mynd Jan Müller/oljan.fo

Mest og Pam síggja stórar møguleikar í Skotlandi

Jan Müller

11.09.2015 - 09:37

Oljan.fo

MEST-samtakið hevur fingið ítøkiligar fyrispurningar um samstarv við skotskar fyritøkur og skulu nú nærri samráðingar til. Útbyggingin av dokkini á Skála er ein týðandi lykil til at fáa útlendsk frálandsskip til Føroya sigur Richard Mortensen, sølu- og marknaðarleiðari, sum hesar seinastu dagarnar hevur verið á oljumessu í Aberdeen og saman við øðrum koyrt verkætlanina “Faroe Islands Maritime Services” av bakkastokki.

Nýggj og spennandi verkætlan av bakkastokki

Millum føroysku vinnufyritøkurnar, sum hava bjóðað seg fram á altjóða oljumessuni í Aberdeen í hesum døgum, er eisini MEST samtakið við dótturfelagnum PAM Offshore Service. Fyritøkurnar báðar, sum dyggiliga stóðu sveinaroyndina at umvæla boripallin West Hercules í fjør til eitt UG, ætla sær ikki at seta seg hendur í favn og bíða eftir, at kundarnir einaferð skulu koma til Føroya av sær sjálvum. Tvørturímóti er ætlanin at vera úti um seg í umheiminum og fáa nýggjar kundar til Føroya. Og hetta varð m.a. gjørt sum partur av spildurnýggja tiltakinum "Faroe Islands Maritime Services", ið fór av bakkastokki á oljumessuni í Aberdeen í vikuni.

Tey bæði, Richard Mortensen, sølu- og marknaðarleiðari hjá MEST samtakinum og Anja Jacobsen, dagligur leiðari fyri PAM Offshore Service, umboðaðu føroysku fyritøkuna. Umframt at vera partur av føroyska básinum nýttu tey bæði eisini høvi til at vitja kundar og menna sambond. Haraftrat hevði Richard Mortensen ta álitisuppgávu at standa á odda fyri at marknaðarføra tiltakið "Faroe Islands Martime Services", nú hann í tríggjar dagar á rað hevði eina framløgu um Føroyar sum maritiman tænastudepil.

Hóast Richard leingi hevur verið eitt kent andlit í føroyskum vinnulívi, so var hetta fyrstu ferð, at hann sjálvur luttók á eini oljumessu í útlandinum. Sjálvur heldur hann, at hetta hava verið nakrir sera gevandi dagar.

"Bæði hvat viðvíkur PAM og MEST, haldi eg man kannn siga, at vit hava fingið fitt burturúr. Tó at man altíð skal vera ansin ikki at selja skinnið, fyrr enn bjørnin er skotin. Men vit hava fingið heilt ítøkiligar fyrispurningar bæði kring Pam og Mest økini, so vit skulu nú til at geva tilboð, sum kunnu gerast sera spennandi."

Richard Mortensen vísir á, at tey hava fingið fyrispurningar frá fyritøkum um at tosa nærri um samstarv.

Gott umdømi

"Fyri okkum er tað hugaligt at vita, at PAM sum fyritøka hevur fingið eitt sera gott umdømi. Í løtuni hevur Pam millum 150 og 200 fólk til arbeiðis í Norra. So tað framúr góða arbeiði, sum okkara starvsfólk gera, og tað umdømi tey fáa, fáa vit nú sera góðar afturmeldingar frá. Vit vita ikki rættiliga, um tað hevur spjatt seg til skotskar fyritøkur, men so ella so hevur tað eydnast okkum at koma á tal við skotskar fyritøkur, kanska sum ein avleiðing av, at vit hava arbeitt saman við væl kendum norskum fyritøkum."

Nú altsamt fleiri fólk verða uppsøgd í oljuvinnuni heldur Richard Mortensen tað vera sera umráðandi at røkta tær relatiónir, sum fyritøkan hevur, alt tað tey kunna og at halda fast.

"Sjálvandi er trýst á prísin, sum tíðirnar eru, men vit ímynda okkum, at tað tá verður uppaftur meira umráðandi, at man hevur tey røttu starvsfólkini. Tí tað sæst aftur í útreiðslunum hjá fyritøkunum. Um arbeiðið verður gjørt til tíðina, og fólk eru álítandi, so er tað ein sera góð støða at vera í.

Richard Mortensen hevur saman við Anju Jacobsen frá Pam Offshore Service vitjað nógvar áhugaverdar kundar á oljumessuni. Umframt at vitja básar á oljumessuni hevur eisini verið vitjað umborð á einum spildurnýggjum frálandsskipi í havnini í Aberdeen.

Útbygging av dokkini lykilin

“Tað var heilt einastandandi at síggja hetta skipið. Og tey har umborð siga bart út, at tey síggja fyri sær, og tað er heilt náttúrligt, at tað verður eitt samstarv við Føroyar innan tað økið. Ein partur av teirra flota arbeiðir vestan fyri Hetland upp móti føroyska markinum. Tey hava ikki enn roynt hetta at leggja skipini inn í Føroyum og fáa tey umvæld her. Men tað er hetta, sum liggur í kortunum, so tað var sera áhugavert at hoyra frá tveimum fyritøkum, sum hava stór og spildurnýggj skip, at tær ynskja kanska at royna okkum bæði til at gera vanligar umvælingar og eisini at koma í dokk. Hetta er so nakað vit eru farnir undir at menna, nevniliga at útbyggja dokkina á Skála til at kunna taka ímóti frálandsskipum, ið hava tørv á at fáa umvælingar gjørdar, tá skip eru á turrum.

Vit eru í ferð við at byggja dokkina út við einum brunni, sum er 40 fermetrar og 4-5 metrar djúpur, og tað er lykilin til at fáa supplyskip til Føroya, inn í dokkina. Hetta arbeiðið verður m.a. gjørt í samstarvi við supplyfeløg í útlandinum, sum geva okkum vegleiðing um, hvussu hetta skal gerast. Henda útbyggingin er í gongd og verður liðug um 2-3 vikur.”

À Mest eru tey eisini sera spent um, hvat henda nýggja íløgan kann skapa av nýggjum uppgávum, tí skal talan vera um at bjóða seg fram til at umvæla frálandsskip, so mugu hesar umstøðurnar vera í lagi.

Richard Mortensen leggur aftrat, at henda íløgan er partur av ætlanini at gera Skálafjørðin til tann føroyska oljufjørðin.

Hann vónar, at føroyska luttøkan á oljumessuni í Aberdeen er við til at staðfesta áhugan hjá føroyskum fyritøkum at virka í oljuvinnuni, samstundis sum útlendskar fyritøkur fáa eyguni upp fyri møguleikunum at fáa vørur og tænastur í Føroyum.

“Tað var ein fragd at greiða frá um Føroyar og møguleikarnar at kunna brúka føroyskar vørur og tænastur á føroyska básinum í Aberdeen. Tað hevur verið sera hugaligt at hitta mong av fólkunum á básinum, og hetta hevur givið okkum nýggjan íblástur til kanska at vera uppaftur meira neyv næstu ferð í okkara miðvísu marknaðarføring. Hetta er so avgjørt eitt stig á leiðini.”

MARITIME
SERVICES

FAROE ISLANDS

FAROE ISLANDS